Stór undirtøka fyri uppbo›s-sølu

Ta› gekk upp á stás, tá uppbo›s-søla av listarverk-um hjá meira og minni kendum føroyingum var í Klaksvík sunnu-dagin

UPPBO‹SSØLA
Ey›un Klakstein

Fólk bjó›a›u óført, og ta› gekk lívliga fyri seg, tá Lions Club í Klaksvík hev›i uppbo›ssølu í Ósáskúlanum sunnudagin.

Á uppbo›ssøluni vóru málningar eftir fólk, sum vanliga ikki fáast vi› málningalist, seldir, og hugskoti› var eftir øllum at døma so gott, at ta› rættiliga fekk fólk at bjó›a.

- Tiltaki› eydna›ist nógv betur, enn vit høvdu rokna› vi›, og vit eru sera fegnir um, at fólk tóku so væl undir vi› tí, sigur Hákun Dam, forma›ur í Lions Club Klaksvík.

Øll tey 39 verkini vóru seld. Ta› bíligasta fór fyri 600 krónur, me›an ta› d‡rasta fór fyri heili 11.500 krónur. Hendan málningin hev›i Jaspur Petersen, kommunulækni í Klaksvík, mála›, og líkt er til, at hann saktans kann fara at gera meira vi› málingina.

Uppbo›shaldari í hopla

Millum listarmenninar vóru eisini fólk sum Leivur Hansen, Jógvan vi› Keldu, Peter O. K. Olofson, Niels Pauli Danielsen, Karl Martin Samuelsen og Óli Breckmann.

Uppbo›shaldari var Christian Olsen, og hann kom serstakliga væl frá uppgávuni.

Umframt uppbo›ssølluna var eisini undirhald á skránni.

B‡rá›slimir sungu tríggjar sangir, og Hans Hjalti Skaale og Sjúr›ur Ravnsfjall spældu.



Fólk høvdu stóran hug at bjó›a, tá uppbo›ssøla av listarverkum var í Klaksvík sunnudagin

Mynd: TS

Hava kanna› hundra› føroysk børn í Danmark

Hendan gentan er ein av teimum, sum er vi› til at geva føroyskum granskarum vitan, sum gevur afturljó› í øllum heiminum. Hesa seinastu tí›ina eru umfatandi kanningar gjørdar av umlei› 100 føroyskum børnum í Danmark. Endamáli› er at vita, um tey framvegis eru ávirka› av teirri kyksilvureitranini, sum var› sta›fest, tá i› tey vóru sjey ára gomul. Kanningarnar fóru fram í Odense

Mynd: Nordfoto

Um eitt gott ár fæst at vita um tey ska›iligu árinini av kyksilvuri, sum var› sta›fest hjá sjey ára gomlum føroyskum børnum fyri nøkrum árum sí›ani, standa vi›

GRANSKING
Áki Bertholdsen

Fyri nøkrum árum sí›ani vaktu føroyskir granskarar miklan ans kring allan heimin, tá i› teir prógva›u, at kyksilvur í ávísum mongdum ávirkar menningina hjá børnum.

Nú arbei›a teir vi› eini a›rari kanningarætlan, sum kanska fer at vekja líka stóran ans.

Ta› var í fyrru helvt av nítiárunum, at føroyskir granskarar kanna›u eini 100 føroysk børn í sjey ára aldri. Hetta vóru børn, sum vóru fødd í 1986-1987 og tey vóru sjey ár, tái› tey vór›u kanna›.

Hendan kanningin prógva›i, at kyksilvur í ávísum mongdum ávirka›i menningina av børnum so miki›, at ta› kundi mátast. Úrsliti› av kanningini hevur vakt miklan ans nógvasta›ni kring heimin. Men nú er kanningin yvirhøvur vi›urkent og myndugleikar eru so vi› og vi› farnir at taka úrsliti› til eftirtektar. Avlei›ingin av tí er, at teir eru farnir mæla til at lækka hámarki› fyri, hvussu nógv kyksilvur kann vera í mati, sum vit eta.

Líka stóran ans

Endamáli› vi› hesari n‡ggju granskingarætlanini, sum teir nú eru farnir í holt vi›, er at vita, um ta› óhepna árini›, sum var› sta›fest hjá teimum sjey ára gomlu børnunum, broytist naka› vi› aldrinum.

– Stutt sagt ætla vit at kanna, um ta› óhepna árini›, sum kyksilvur hevur á tey sjey ára gomlu børnini versnar vi› árinum, um ta› batnar, ella um ta› stendur í sta›, sigur Pál Weyhe, sum stendur fyri kanningunum.

Fyri at koma til eitt úrslit eru tey tí farin í holt vi› at kanna tey somu børnini einafer› afturat, sum vóru kanna› fyri sjey átta árum sí›ani.

–Nú eru hesi børnini blivin 14 ára gomul og tí ætla vit at vita, um tey framvegis eru ávirka› av kyksilvurinum, og í hvønn mun tey eru ávirka› nú, afturímóti tá i› tey vóru sjey ár.

Pál Weihe sigur, at í fjør vór›u 400 børn kanna› og næsta ár ver›a so eini 500 børn kanna› afturat.

Hann sigur, at so er ta› stóra arbei›i eftir at útgreina tær mátingar, sum eru gjørdar. Men hann væntar at ein ni›urstø›a skuldi veri› grei› um ársskifti› 2001-2002.

Kanna 100 børn í Danmark

Men ta› er nógv hent sí›ani fyrru helvt avnítiárunum, tá i› børnini vór›u kanna› fyrstu fer›. Og ein trupulleiki, sum føroysku granskararnir hava fingi› er, at av teimum umlei› 1.000 børnunum, sum vór›u kanna› tá, eru eini 138 flutt uttanlands at búgva sí›ani.

Nøkur eru flutt til Noregs, onkur til Grønlands o.s.fr.

Men ey›vita› eru tey flestu flutt til Danmarkar og tilsamans eru ta› nú umlei› 100 av hesum børnum, sum nú búleikast á Flatlondum.

Og tey børnini eru nú kanna›

Hesa seinastu tí›ina hevur eitt li› av føroyingum veri› í Danmark og gjørt hesar kanningarnar.

Ein kanningarstø› er sett upp í Odense, sum er mitt í Danmark og hagar eru so tey føroysku børnini úr øllum landinum farin at ver›a kanna›.

Kanningarnar eru drúgvar og átta børn eru kanna› um dagin.

Pál Weihe sigur, kanningarnar hava gingi› avbera væl og hann fegnast um at foreldur og børn hava víst so gó›an vilja at vera vi› í hesum kanningunum.

Ætla at kloyva Su›uroy í tvey eftir Hovsegg

Ver›ur Su›uroyggin løgd saman í tvær kommunur, ætlar landsst‡ri› at flyta eitt gamalt kommumark, so at ein stórur partur av Hovs Kommunu ver›ur lagdur afturat Tvøroyri

KOMMUNU-SAMANLEGGING
Áki Bertholdsen

Ver›ur Su›uroyggin løgd saman í tvær kommunur, skal ein stórur partur av Hovs Kommunu leggjast afturat Tvøroyri.

Ta› hevur Føroya Landsst‡ri› nú bo›a› kommununum í Su›uroyunni frá.

Allar kommunurnar í Føroyum hava í seinastuni fingi› eitt uppskot um kommunusamanlegging frá landsst‡rinum.

Uppskoti› skal setast í gildi á n‡ggjárinum.

Landsst‡ri› ætlar ikki at tvinga kommunur at leggja saman. Eftir uppskotinum skal tvørturímóti ver›a talan um sjálvbodnar kommunusamanleggingar. Men gera kommunur sjálvbodnar av at leggja saman, skal ta› gerast eftir einum heilt ávísum leisti.

Og ver›a kommunur lagdar saman, kann Landsst‡ri› samtykkja at flyta tey gomlu kommunumarkini. Men ta› skilst, at so skal semja ver›a ímillum kommunurnar um ta›.

Su›uroy í eitt ella tvey

Eftir uppskotinum hjá landsst‡rinum ver›a tveir møguleikar fyri samanlegging í Su›uroy.

Annar møguleikin er, at øll Su›uroyggin ver›ur ein kommuna. Hin møguleikin er, at hon ver›ur løgd saman í tvær kommunur, har Sumba, Vágur, Porkeri og Hov eru í Su›ursu›uroyar Kommunu og Fámjin, Tvøroyri og Hvalbiar Kommuna manna Nor›su›uroyar Kommunu.

Vágs B‡rá› vi›gjørdi uppskoti› á fundi í farnu viku. Á fundinum var› uppl‡st, at ver›ur Su›uroyggin løgd saman í tvær kommunur, er ta› ætlanin at gamla kommunumarki› ímillum Hov og Tvøroyri skal flytast

Sum er, gongur Hovs Kommuna naka› inn á Trongisvágsfjør› og ta› er langt sí›ani, at Tvøroyrar B‡rá› gjørdi greitt, at ta› vildi ta› marki› broytt. Ta› var› hildi› at vera órímiligt, at Su›ursu›uroyar Kommuna skuldi ganga langt inn á Trongisvágsfjør›.

Og hetta hevur landsst‡ri› eftir øllum at døma tiki› til eftirtektar.

Tí á fundi í Vágs B‡rá› var› uppl‡st, at landsst‡ri› hevur bo›a› frá, at ver›ur Su›uroyggin koyrd í tvey, er ta› ætlanin at n‡ggja kommunumarki› ímillum nor›aru og sy›ru helvt, skal ganga eftir Hovsegg. Sostatt ver›ur ein stórur partur av tí, sum nú er Hovs Kommuna, løgd afturat tí, sum nú er Tvøroyrar Kommuna. Sostatt kemur annar parturin av tí, sum nú er Hovs Kommuna at liggja í Nor›su›uroyar Kommuna og hin parturin kemur at ver›a í Su›ursu›uroyar Kommunu.

Vágs B‡rá› tekur samtykti annars at taka undir vi› uppskotinum hjá landsst‡rinum um, at Su›uroyggin kann ver›a antin ein, ella tvær kommunur.

Men eitt samt b‡rá› samtykti eisini at mótmæla ætlanini hjá landsst‡rinum at flyta ta› gamla kommunumarki› ímillum Hov og Tvøroyri.

Og ta› mótmæli ver›ur nú sent landsst‡rinum.

Tann brotna strikan vísur, hvar marki› ímillum Hov og Tvøroyri gongur nú. Tann heila strikan vísir álei›, hvar landsst‡ri› ætlar at ta› n‡ggja marki› skal vera, um Su›uroyggin ver›ur løgd saman í tvær kommunur. Bæ›i vágbingar og hovbingar mótmæla ætlanini at flyta kommunumarki›



Hovbingar siga bums nei

Teir vilja ikki hoyra talan um at kommunan skal b‡tast í tvey, um so er, at Su›uroyggin ver›ur løgd saman í tvær kommunur

KOMMUNU-SAMANLEGGING
Áki Bertholdsen

– Ta› ver›ur neyvan vi› gó›um at hovbingar fara at go›taka, at kommunan ver›ur koyrd í tvey.

Ta› heldur Asbjørn Berg, bygdará›sforma›ur í Hovi. Sostatt skal landsst‡ri› ikki vænta sær hjálp úr Hovi til at flyta kommunumarki›, so at ein partur av Hovs kommunum ver›ur lagdur afturat Tvøroyrar Kommunu

Sum greitt er frá í greinini ”Ætla at kloyva Su›uroy í tvey eftir Hovsegg”, er ta› annars ætlanin hjá Landsst‡rinum, at ver›ur Su›uroyggin løgd saman til tvær kommunur, skal kommunumarki› hjá Hovi flytast, so at ein stórur partur av Hovs kommunu ver›ur lagdur afturat teirri nor›ar kommununi í Hovi, íme›an bygdin sjálv ver›ur løgd afturat teirri sy›ru kommununi.

Ásbjørn Berg sigur, at bygdará›i› hevur ikki vi›gjørt máli› nú,

– Men ta› er ein gomul ætlan at flytakommunumarki›, um Su›uroyggin ver›ur løgd saman í tvær kommunur. Og vit hava umrøtt máli› fyrr, og tá var einmælt samtykt, at ta› var› als ikki gó›tiki› at kommunumarki› ver›ur flutt.

Hann væntar eisini, at ta› komandi bygdará›i›, sum skal taka vi› á n‡ggjárinum fer at taka somu stø›u.

Bygdará›sforma›urin sigur, at í Hovi eru tey slett ikki sinna› fyri at leggja saman vi› nøkrum, uttan so, at øll Su›uroyggin ver›ur ein kommuna.